# Endaliga avgjørt at Henning fer til Íslands

*Nú er endaliga avgjørt, at Hennig Jarnskor skal við Pól Thorsteinssyni til íslendska 2. deildarliði Valur.*

Heini í Skorini



Henning Jarnskor, sum hevur spælt við GÍ í mong ár, skal nú saman við Pól Thorsteinssyni til íslendska 2. deildarliði Valur. Tað hevur leingi liðið í luftini, at Henning skal út um landoddarnar at royna seg, og nú er tað so endaliga avgjørt. GÍ má sostatt klára seg uttan tveir av lyklaleikarunum frá í fjør, tí umframt at Henning nú fer til Val, er Sámal Joensen jú eisini farin til íslendska felagið Leiftur.

Spurdur, um hann væntar at menna seg sum fótbóltsleikara í næstbestu deildini í Íslandi, sigur hann, at tað ivast hann ikki í.

– Tað eru nógvar nýggjar avbjóðingar, sum heilt víst fara at menna meg sum leikara, sigur Henning við Sosialin.

Henning sigur eisini, at um alt gongur sum eftir ætlan, fer hann avstað fríggjadagin.

– Hetta er ein dreymur, sum man hevur havt, líka frá tí man byrjaði at spæla fótbólt, sigur Henning eisini.

– Eg dugi ikki at siga, hvussu støði verður samanborið við føroysku 1. deild, men Valur flutti niður úr bestu íslendsku deildini í fjør, og tað er fyrstu ferð í søguni, at teir flyta niður, so vit ætla okkum uppaftur sum skjótast, leggur Henning afturat.

Spurdur, um hann tekur henda møguleika sum eina lopfjøl til at koma longri í fótbólti, sigur hann:

– Eg veit ikki heilt. Nei, ikki beinleiðis. Eg taki tað fyrst og fremst sum eitt upplivilsi fyribils.

At enda sigur Henning, at sáttmáli hansara við Val fer at ljóða uppá 3 ár, og vit ynskja honum góða eydnu yviri í Íslandi!

## Roysnið skipar fyri rennikapping

*Leygardagin skipar Roysnið fyri uml. 21 km langari rennikapping inni í Eysturoynni*



Heini í Skorini

Leygardagin 8. apríl, skipar Roysnið fyri rennikapping inni í Eysturoynni. Teinurin sum runnið verður, áðrenn komið er á mál, er uml. 21,1 km, sum eisini verður kallað eitt hálvmarathon. Byrjað verður at runnið á vegnum til Funningsfjørð áraka bergholinum, og rennararnir koma á mál á keiini á Toftum.

Kappinginga seinasta ár vann Regin Zachariassen úr Vestmanna, og tíðin hjá honum tað ferðina var 1 tími 22 min. Ein onnur rennikapping hevur eisini júst verið, og tað var fyri 14 døgum síðani. Tá vann Guttorm Sørensen á 10 km teininum í Runavík, so hann má sigast at vera favorittur til 21,1 km rennikappingina leygardagin.

Byrjað verður at runnið kl. 14.00, og øll tey, ið hava hug at luttaka, skulu møta á keiini á Toftum ein tíma, áðrenn kappingin byrjar.

# Væleydnað svimjikapping í Klaksvík

*Stór SUM svimjikapping var í Klaksvík um vikuskiftið. Kappingin setti føroyskt met við ikki minni enn 181 luttakarum.*

Heini í Skorini

Í vikuskiftinum var skipað fyri stórari svimjikapping í Klaksvík. Kappingin var tann árliga SUM kappingin, sum stendur fyri smáunglingameistaraheitið. Kappingin gekk av tí allarbesta, og fyriskiparnir vóru væl nøgdir, tá kappingin var liðug. Í mun til undanfarnu SUM kappingar, var hetta nógv tann størsta kappingin, ið higartil er hildin í Føroyum, bæði tá hugt verður eftir kappingartali (64 kappingar), og luttakarum, sum ikki var minni enn 181! Hjálparfólkini vóru úr øllum feløgum kring landið, og tey gjørdu øll eitt dygdargott arbeiði, og høvdu sostatt sín stóra leiklut í, at kappingin eydnaðist so væl.

Ymiskar áskoðanir vóru um kappingarumførini, og onkur helt, at ov nógvar kappingar vóru lagdar fríggjakvøldið og leygarmorgun, og at hetta gekk út yvir svimjarar og hjálparfólk. Hetta, og aðrar áskoðanir um, hvussu og hvørjar kappingar skulu vera næstu ferð, fer svimjinevndin at viðgera og leggja fram fyri feløgini, áðrenn støða verður tikin á komandi kalendarafundi, sum tað verður kallað.



### Øll tey sjey feløgini fingu heiðursmerkir

Svimjifeløgini, ið umboða vóru á SUM svimjikappingini ár 2000 vóru: Ægir úr Klaksvík, Fuglafjarðar Svimjifelag, Skeggjar úr Gøtu, Flot av Toftum, Havnar Svimjifelag, Tvøroyrar Svimjifelag og Vágs Svimjifelag. Sum sagt vóru 181 luttakarar í hesi kapping, og tað er tað mesta luttakaratalið nakrantíð í Føroyum. Hetta vísir, at føroysk svimjing er í menning, og er hetta at frøðast yvir. Samlaða støðan gjørdist hendan:

1. Tvøroyrar Svimjifelag
20 gull, 15 silvur, 9 bronsu
2. Havnar Svimjifelag
19 gull, 24 silvur, 27 bronsu
3. Skeggjar úr Gøtu
19 gull, 13 silvur, 8 bronsu
4. Ægir úr Klaksvík
5 gull, 5 silvur, 9 bronsu
5. Flot av Toftum
1 gull, 2 silvur, 0 bronsu
6. Vágs Svimjifelag
0 gull, 0 silvur, 5 bronsu
7. Fuglafjarðar Svimjifelag
0 gull, 0 silvur, 1 bronsu



# – Føroyski fimleikurin er í stórari menning

*Soleiðis sigur formaðurin í Føroya Fimleikasambandi, Andreas Lamhauge, um fimleikin í Føroyum í løtuni*

Heini í Skorini
Myndir:
Álvur Haraldsen
og Birgir Sondum



*Myndirnar eru frá fimleikaframsýningum, sum hava verið í Havn og á Skálafjørðinum seinastu dagarnar*



Hesar seinastu vikurnar hava fimleikaframsýningar hjá teimum ymisku feløgunum verið at sæð kring landið. Vit hava hugt eitt sindur at fimleiki í Føroyum í løtuni, og fingið okkum eitt prát við núverandi formann í FFS, Andreas Lamhauge.

*Hvussu ert tú nøgdur við føroyskan fimleik í løtuni?*
– Eg haldi at føroyskur fimleikur er í stórari framgongd. Tað hava vit sæð í oyggjaleikunum, og eisini tá hugt verður at Grand Prix liðum sum hava verið niðri í Danmark. So eg haldi, at vit fylgja rættiliga væl við. Men vit stremba í hvussu so er eftir at koma longri, tað gera vit.

Føroyskur fimleikur er avgjørt í menning í løtuni, og tað sær man eisini á limafeløgunum hjá teimum ymisku feløgunum kring landið. Har er sera stór tilgongd í løtuni.

Andreas Lamhauge leggur afturat, at umstøðurnar til fimleik kundu verið nógv betri, og har er tað serliga reiðskapsfimleikurin, sum er við sviðusoð.

*Hvussu metir tú áhugan vera fyri fimleiki í løtuni?*
– Sum eg segði í áðni, so er hann avgjørt í menning. Vit hava stóra tilgongd í øllum feløgum, og m.a. er Klaksvíkar Fimleikafelag aftur farið í gongd, eftir at hava liðið stilt í nógv ár.

*Kann nakað gerast fyri at fáa áhugan at blíva størri?*
Ja, tað eru sjálvandi umstøðurnar sum avgera tað, so betri umstøður fimleikurin fær, størri gerst áhugin. tað er í stuttum tað, sum kann fáa fimleikin at blíva betri umtóktur. Í løtuni eru sjey fimleikafeløg í Føroyum, og eg haldi at tað er heilt hampiligt. Tað eru bara Vágoyggin, sum ikki hevur nakað fimleikafelag, so tað hevði verið gleðiligt at fingið eitt fimleikafelag upp at standa har. Annars sær heilt hampiligt út haldi eg.

Spurdur um framtíðina sigur Andreas, at hann metir framtíðina vera sera góða hjá føroyskum fimleiki!







